## Svenskar stjørnur tveittar heim

Tríggjar av heilt stóru stjørnunum á svenska landsliðnum, Zlatan Ibrahimovic, Olof Mellberg og Christian Wilhelmsson, vera ikki partur av liðnum, sum mikudagin skal spæla í móti Liktinstein. Hetta boðar svenska fótbóltssambandi í einum tíðindaskrivi í morgun.

- Sunnudagin fingu spælararnir frí seinnapartin og um kvøldið, og avtalan var, at savnast aftur á hotellinum klokkan ellivu. Hesa avtalu hildu allir leikararnir, men seinni fóru tríggir av leikarunum út aftur, og vóru ikki heima fyrr enn klokkan 01.15.

Landsliðsleiðslan metir, at teir hava brotið eina greiða avtalu, og tí hava vit tikið avgerð um, at teir tríggir vera koyrdir úr hópinum umgangandi. Leikarar og leiðsla vilja ikki gera fleiri viðmerkingar til málið í vikuni.



## MB fingið nýggja heimasíðu

Miðvágs Bóltfelag hevur fingið nýggja heimasíðu. Teir seinastu mánaðarnar hava nevndarlimir í MB arbeitt í tøttum samstarvi við starvsfólkið á Stephanssons Hús, við tí fyri eyga, at fáa eina nýggja heimasíðu upp at koyra. Ikki kann sigast annað, enn at hetta samstarvið hevur riggað sera væl og at úrslitið eisini er hareftir. Felagið fegnast um síðuna, og skrivar í einum tíðindaskrivi, at øll sum hava havt við menningina av heimasíðuni skulu hava stóra tøkk! Heimasíðan er at síggja á www.mb1905.fo.

# Gudmundur vann FM í sprint triathlon

**Leygardagin var kappast í FM í sprint triathlon, og her var Gudmundur Joensen nógv tann skjótasti**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*



*Hesir ítkararnir vóru við í FM í sprint triathlon leygardagin*

Føroya Triathlon Felag skipaði sunnudagin fyri sprint triathlon. Kappingin var í Havn, og kappast var á hesum teinum: 750 m svimjing, 20 km súkkling og 5 km renning. Hetta er væl styttri enn vanliga triathlon, og av tí kemur heitið sprint triathlon.

Fyrst var svomið í Svimjihøllini í Gundadali. Liðugur at svimja, skuldi ítkarin skunda sær út á súkkluna og súkkla frá Svimjihøllini eftir Norðara Ringvegi, fram við Strond til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C.Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 3 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins. Her var skift til renning, og runnið var frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins. Teinurin var runnin 6 ferðir.

### Gudmundur á odda beinanvegin

Gudmundur Joensen var fyrst úr hylinum, síðani kom Súsanna Skylv og uml. 2 minutt aftaná komu so Evald Rasmussen, Beinir Rasmussen og Andrass Joensen. Nakað aftanfyri teir komu so Kári Simonsen og Áslakkur Nesá.

Gudmundur var eisini fyrstur út á súkkluna, við Súsonnu í hølunum. Evald, sum var triðjur upp úr hylinum, skifti skjótast og fekk skjótt fatur á Súsonnu, men Andras, sum var eitt sindur seinni úr hylinum, vísti hesaferð, at hann er ein góður súkklari og megnaði at fáa Evald aftur, so báðir fóru út á renniteinin í senn.

Gudmundur var tá komin hálva leið runt fyrstu ferð, og eingin fekk hann aftur, hann bara økti og kom fyrstur um málstrikuna. Andrass og Súsanna runnu bæði væl, og komu á mál sum nr 2 og 3.

Evald kom fjórður um strikuna, við Áslaki í hølunum. Áslakur, sum var seinastur úr hylinum, vann seg skjótt fram í súkklingini, yvirhálaði bæði Beinir og Kára, og var í renningini við at fáa fatur í Evaldi, sum tó varnaðist vandan og setti ferðini so frægt upp, at hann kom á mál ½ minutt framanfyri Áslak.

Beinir Rasmussen, sum bleiv lokkaður við í síðstu løtu, legði út sum eitt óløgi í svimjingini, men mátti ásanna, at venjingin ikki er tað, hon einaferð var. Kári vann seg alla tíðina inn á hann, og á frysta renniumganginum fár hahh fram um Beinir, sum sostatt endaði aftastur.

Eisini var kappast í 1/12 triathlon.

Í 1/12 triathlon var bara tann eini ítkarin. Rannvá Djurholm hevði hesaferð lænt sæt eina kappingarsúkklu, og ikki kan sigast annað enn at væl gekst. Samanlagt var hon uml. 6 minuttir skjótari samanborið við í fjør, tað mesta í súkklingini, men ½ minuttur fór eisini av í svimjingini

16. sept verður aftur kappast, tá er tað FM á OL-teininum í triathlon, sum sær soleiðis út: 1500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning. Kappast verður tá eisini eisini í 1/12 triathlon.

# U19 genturnar taptu bronsudystin

**U19 flogbóltslandsliðini hjá gentum og dreingjum vóru um vikuskiftið við NM-kapping í Danmark. Genturnar spældu bronsudyst, men taptu. Dreingirnir taptu allar sínar dystir**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nevza Cup varð hildin í Ikast um vikuskiftið, og føroysku U19 landsliðini hjá bæði gentum og dreingjum vóru við í kappingini, sum er NM-kapping.

Tað gekk heldur betur hjá gentunum enn dreingjunum, sum taptu allar sínar dystir. Genturnar vunnu onkrar dystir og komu í hálvfinaluna, sum tær taptu.

Mótstøðan hjá dreingjunum var sera hørð, og tað var lítið at gera ímóti teimum sterkastu liðunum í kappingini. Føroyar spældu tó ein góðan dyst ímóti Onglandi og taptu hann tepurt 3-2. Føroyska liðið endaði aftast í kappingini.

Genturnar løgdu fyri við at vinna 3-0 á Íslandi, men taptu so fyri 3-1 fyri Svøríki. Føroyar vunnu eisini á Onglandi dagin eftir, men máttu so lúta fyri Noregi í hálvfinaluni.

Sunnudagin var spældu Føroyar dyst um bronsuna ímóti Danmark, og hóast føroyska liðið vann fyrsta settið, endaði dysturin við 3-1 tapi.

Føroyar endaðu sostatt nummar fýra í kappingini frammanfyri bæði Ongland og Ísland.



*Føroyska U19 gentulandsliðið í flogbólti stóð seg væl í NM í Ikast um vikuskiftið. Liðið endaði sum nummar fýra í kappingini*